Karsten Hansen:

Sosialurin skal prógva at eg havi logið

– Sosialurin hevur skuldsett meg fyri at lúgva og tað skal hann sleppa at prógva, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

ÆRUMEIÐING
Áki Bertholdsen

–Sosialurin hevur skuldsett meg fyri at lúgva og tað finni eg meg slett ikki í.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur tikið sær greinina í Sosialinum leygardagin rættiliga nær.

So nær, at hann nú hevur biðið sakførara koma upp í málið.

Leygardagin skrivaði Sosialurin um fíggjarligu trupulleikarnar á Læraraskúlanum. Í tí sambandi hevði sosialurin fingið innlit í skjøl, sum vístu, at longu í februar í ár varð landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kunnaður um trupulleikarnar hjá Læraraskúlanum.

Hetta hendi ,táið landsstýrismaðurin í mentamálum mælti Karsten Hansen til at søkja Løgtingið um eina hálva millión á eykajáttanarlógini, sum skuldi leggjast fyri tingið tá.

Men tað vildi Karsten Hansen ikki og tí var Læraraskúlin ikki við, tá ið umsókn um eykajáttan til ymisk endamál varð løgd fyri tingið.

Hetta gjørdi at Sosialurin kom til ta niðurstøðu, at Karsten Hansen hevði sagt ósatt, tá ið hann fyri stuttum segði alment, at trupulleikin á Læraraskúlanum var nýggjur fyri honum.

Skal prógvast

Karsten Hansen følir seg so ærumeiddan av greinini í Sosialinum, at hann hevur biðið sakførara koma upp í málið.

Tá ið vit tosaðu við hann í gjáramorgunin, bíðaði hann eftir eini frágreiðing frá sakføraranum.

– Sosialurin hevur lagt meg undir at lúgva og tað finni eg meg ikki í. Hetta er ein skuldseting, sum Sosialurin skal sleppa at prógva, sigur Karsten Hansen.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, følir seg so ærumeiddan av eini grein í Sosialinum leygardagin, at hann nú hevur biðið sakførara koma upp í málið

Karsten Hansen sigur, at tað er ikki nýtt fyri sær, at Læraraskúlin hevur trot á peningi.

– Orsøkin til, at umsóknin frá februar um at seta Læraraskúlan á eykajáttanarlógina, var, at tá var ikki talan ikki at finna peningin á onkrari aðrari játtan hjá mentamálastýrinum. Tá var hinvegin talan um at játta mentamálastýrinum meiri pening til at lata Læraraskúlanum.

Annars hevur Karsten Hansen als ongar viðmerkingar til Sosialin um málið.

– Hetta fer at verða loyst upp á ein heilt annan máta, sigur Karsten Hansen.

Vilja sleppa at byggja meiri út

Seks tær størstu kommunurnar í landinum fara nú at hava fund við Landsstýrið, har tær fara at royna at rúmari ræsur at byggja út. Hámarkið, sum landsstýrið hevur sett, er ov lágt, halda tær

KOMMUNAL BYGGING
Áki Bertholdsen

Tað er stórur áhugi hjá føroyskum kommunum at byggja út. Men sum er, sleppa tær ikki at byggja út sum tær vilja, tí landsstýrið hevur sett hámark fyri, hvussu stórar tær kommunalu útbyggingarnar kunnu vera.

Hetta vilja kommunurnar nú hava broytt.

Í Sosialinum fríggjadagin vitstu vit at siga, at Føroya Kommunufelag arbeiddi fyri at fáa hámarkið fyri kommunalum útbyggingum tikið av og at fundur skuldi vera við Landsstýrið um hetta í næstum.

Í Kommunufelagnum eru 40 av teimum lítlu og miðalstóru kommununum limir.

Hinvegin eru seks tær størstu kommunurnar, Tórshavnar- Klasvíkar-, Runavíkar-, Fuglafjarðar-, Tvøroyrar- og Vágs Kommuna, limir í Býarsamskipan Føroya, ella Býarfelagnum, sum tað eisini verður nevnt.

Og tær hav eisini gjørt vart við hjá Landsstýrinum og vilja hava rúmari ræsur at byggja út.

– Vit hava vent okkum til Landsstýrið og skulu hava vdund við tað um spurningin í næstum, sigur Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, sum er formaður í Býarfelagnum.

Ov trongt

Fyri at hava tamarhald á búskapinum, hevur Landsstýrið ásett, at kommunurnar í Føroyum sleppa ikki at byggja út fyri meiri enn.

Útbyggingarkvotan verður síðani býtt sundur ímillum kommunurnar eftir fólkatalinum.

Jógvan Krosslá sigur, at áhugin hjá kommununum at byggja út er nógv størri enn tann útbyggingarkvotan, sum landsstýrið hevur tillutað teimum.

Hann ásannar, at summar av kommununum eru so mikið illa fyri, at hjá teimum er útbyggingarkvotan ongin trupulleiki.

Hann vísir t.d. á, at tilsamans kunnu kommunurnar í Suðuroynni byggja út fyri 19 milliónir um ári og tað heldur hann, at oyggin átti at klára seg fyri, um tær kundu samstarva um útbyggingarnar, so at ikki allar fara undir stórar útbyggingar ísenn.

Hann hevur sum so heldur onki ímóti, at Landssstýrið roynir at hava tamarhald á, hvussu nógv verður brúkt til verkløg av ymsum slagi, fyri at stýra búskapinum.

– Men hjá nógvum kommununum er útbyggingarkvotan , sum hon nú er, ein álvarsligur trupulleiki og tí vilja vit hava framferðina broytta, sigur Jógvan Krosslá.

Hann sigur, at tað er ikki væntandi, at Landsstýrið er sinnað at taka hámarkið av.

– Men hevðiu tað borið til at fingið skipanina broytta, kundi nógv verið vunnið, heldur hann.

Hann sigur, at Býarfelagið hevur ymisk uppskot at leggja fyri landsstýrið, men endamálið er at fáa kvotuna hækkaða.

Eitt uppskot er at taka havnabygging burturúr útbyggingarkvotuni.

–Av tí at landsstýrið hevur sett hámark fyri, hvussu stórar útbyggingar kommununar kunnu gera, er tað blivið eitt rættiliga stórt haft um beinið á summum kommununum, sigur Jógvan Krosslá, formaður í Býarsamskipan Føreoya, har seks tær størstu kommununar eru limir

– Tað er dýrt at byggja havnir og hevði tað borið til at fingið tær burturúr skipanini, so at tær ikki blivu roknaðar upp í kvotuna, hevði tað bøtt munandi um støðuna, heldur hann. Útbyggingarkvotan, sum kommunurnar so hava, kunnu sostatt verða brúktar til aðrar útbyggingar, eitt nú á mentanarliga og sosiala økinum.

Hann heldur eisini, at tað er skeivt at avmarka møguleikarnar hjá summum kommunum at byggja út, samstundis sum aðrar kommunur ikki brúka sína kvotu.

Fara at byggja hús á Tvøroyri til næmingar

Pláss verður fyri 14-18 næmingum í nýggja næmingabústaðinum á Tvøroyri. Ætlanin er at byggja næsta ár

NÆMINGABÚSTAÐIR
Áki Bertholdsen

Tvøroyrar Býráð hevur ikki ligið á latu síðini, síðani tað varð gjørt av at leggja nýggja almanna- og heilsuskúlan á Tvøroyri.

Fyrst legði býráðið eitt stórt arbeiði í at útvega skúlanum høli at vera í.

Og nú, skúlin er byrjaður, er eisini ætlanin at gera umstøðurnar hjá næmingunum betri.

Ætlanin er nevniliga at nú fara undir at byggja eitt hús til næmingarnar at búgva í, ímeðan teir eru í skúla í Suðurooy.

– Nú vit hava fingið skúlan, má næsta stigið natúrliga vera at útvega næmingunum hóskandi bústaðarmøguleikar og tí ætla vit okkum undir at byggja eitt hús við næmingaíbúðum, sigur Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri.

Hann sigur, at ætlanin er ikki komin so langt enn.

Men kortini er tað komið so frægt í eygað, at ætlanin er at brúka árið í ár til at leggja byggingina til rættis í og so at brúka næsta ár til at byggja í.

14-18 næmingar

Finnleif Guttesen sigur, at enn er ikki endaliga gjørt av, hvar næmingahúsið skal vera.

Men fyrsta metingin hjá honum sigur, at tað verður inni á økinum, har ítróttarhøllin, skúlin og barnagarðurin í Trongisvági, eru.

Tað eru góðir tveir kilometrar frá skúlanum, men tað heldur hann ikki vera ov avsíðis.

–Tvøroyri er ikki nakar stórbýur og tað er væl longri nógva staðni á Havnarleiðini, niðan í Studentaskúlan, sigur hann.

Hann sigur, at tað, sum hann higartil hevur fingið at vita, er, at verða pláss fyri einum 14-18 næmingum í einum slíkum húsi, skuldi tað nøkta tørvin.

– Á skúlanum eru 20 næmingar og onkrir næmingar eru úr Suðuroy, so verður pláss fyri einum 16 næmingum á einum slíkum næmingaheimi, skuldi tað nøkta tørvin, heldur hann.

Hann veit ikki enn, hvat eitt slíkt heim kostar.

Men hann sigur, at ætlanin er at tað skal vera ein sjálvsognarstovnur, sum skal byggja húsið. Parturin hjá kommununi verður sostatt at útvega 10% av byggikostnaðinum. Restin verður fíggja við láni og stuðulsláni og øðrum, sum verður brúkt at fíggja slíka bygging við.

Ætlanin er at fyrireika sjálvsognarstovnin í ár, so at hann kann fara undir at fyrireika byggingina og at byggja komandi ár.

Nú kommunan vísir, at hon tekur tað í álvara, at Almanna- og heilsuskúlin er komin á Tvøroyri, vónar hann, at Mentamálastýrið tekur málið í líka stórum álvara og setir pening av á næstu fíggjarlóg, so at farast kann undir at byggja ein nýggjan skúla, tí tað hevur ongantíð verið talan um annað, enn, at hølini, sum skúlin nú er í, eru ein fyribilsloysn, sigur Finnleif Guttesen.